# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 03.10.2024 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Katrin Kjartansdóttir<br>Magnus Skoralíð<br>Marjun Andreasardóttir<br>Rúni Justinussen<br>Marita Klein Joensen<br>Petur Súni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Hanna Jensen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Ove Heinesen |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 46/24 | 24/00048-2 | Kloakkskipan í Norðragøtu | 3 |
| 47/24 | 24/00172-2 | Gongubreyt í Norðragøtu, matr. nr. a | 6 |
| 48/24 | 24/00419-3 | Broyting av býarplani - matr. nr. 72f og 65a í Norðragøtu | 9 |
| 49/24 | 24/00428-3 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 339m LV | 11 |
| 50/24 | 24/00495-2 | Umbøn um ummæli - Marknaumskipan - matr. nr. 80 og 56a í Norðragøtu | 13 |
| 51/24 | 24/00524-7 | Skipan av matr. nr. 169 á Havnalagnum í Leirvík við Lugarið | 14 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 52/24 | 24/00539-1 | Broyting í býarplani - Partur av matr. nr. 36a í Syðrugøtu verður broyttur frá A Miðstaðarøki til B Bústaðarøki | 16 |
| 53/24 | 24/00540-1 | Skúlin í Leirvík - matr. nr. 422a LV - Útbjóðing | 17 |
| 54/24 | 24/00543-2 | Tilmæli og frágreiðing - Fíggjarætlan 2025 | 19 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 46/24 Kloakkskipan í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.01.2024 | 1/24 | 24/00048-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.01.2024 | 1/24 | 24/00048-2 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.05.2024 | 17/24 | 24/00048-2 |
| 4 Fíggjarnevnd | 28.05.2024 | 18/24 | 24/00048-2 |
| 5 Býráðið | 30.05.2024 | 25/24 | 24/00048-2 |
| 6 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.09.2024 | 31/24 | 24/00048-2 |
| 7 Fíggjarnevnd | 30.09.2024 | 35/24 | 24/00048-2 |
| 8 Býráðið | 03.10.2024 | 46/24 | 24/00048-2 |

**Málslýsing:**

Allar kloakkleiðingar frá vegamótinum Tróndargøtu/við Ánna/Tollaksgøtu verða leiddar til pumpubrunnar á havnarlagnum og pumpaðar á sjógv í útláti sunnast í grótbrotinum.

Innari parturin av bygdini, tvs. frá vegamótinum Tróndargøtu/við Ánna og inneftir verða leidd til felags leiðing, sum liggur framvið ánni, og verður leidd á sjógv niðanfyri kirkjugarðin. Hettar útláti lýkur ikki treytirnar í spillvatnskunngerðini, um at øll útlát skulu leiðast út um brimgarðar v.m. við góðum vatnskifti. Søkt bleiv Umhvørvisstovuna í 2015 um undantak til hettar, og at kanningar skuldu gerast á hvørjum ári 5 ár um staðfestast kundi dálking av botninum í einum radiusi á 50 m frá útlátinum.

Ætlanin er, at gera ein brun til yvirrenning niðanfyri skrivstovuna hjá LUNA, og leggja leiðing gjøgnum Tollaksgøtu út til pumpubrunn omanfyri Fiskavirkið. Við hesari loysnini vil undir vanligum umstøðum, alt vatni verða pumpa út til útlát sunnast í grótbrotinum. Í áarføri fer yvirrenningin í ein brunn, sum síðan verður leidd til útláti niðanfyri kirjugarðin, hetta er tó bert yvirflatu vatn (regn).

Tá vatn minkar aftur verður alt vatni leitt út eftir havnarlagnum og víðari til útlát sunnast í grótbrotinum.

Sí Skjøl í málinum.

**Ískoyti 23.05.2024**

Fýra tilboð er komin uppá kloakkarbeiði í Norðragøtu. RTS hevði lægsta tilboði áljóðandi 1.594.175,- u/mvg. Játtaðir peningur er 1.600.000,- kr. og við óvæntaðum útreiðslum, eftirlit, trygging og kommunu mvg, verður samlaður kostnaðurin 1.940.000,- kr. fyri verkætlanina.
Mælt verður til, at eykajátta 340.000,- kr. til hesa verkætlan.

| |
|---|
| **Ískoyti 23.09.2024**<br>Í fyrra útboði var kloakkin í Tróndargøtu í Norðragøtu ikki boðin út við. Ætlanin var, at fáa alla kloakkina í Norðragøtu lidna. Eg havi fingið tilboð í uppá írestandi kloakk i Norðragøtu og upphæddin fyri kloakkin í Tróndargøtu er 800.000,- kr. v/mvg og óvæntaðum útreiðslum.<br><br>Arbeiði at gera kloakkina í Norðragøtu verður ikki liðug í ár, og kemur nakað inn í 2025. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Avsett eru 1.600.000,- kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at bjóða arbeiði út og at seta arbeiði í gongd, tá tilboð fyriliggja.<br><br>**Ískoyti 23.05.2024**<br>Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.<br><br>**Ískoyti 23.09.2024**<br>Umsitingin mælir til, at játta írestandi pening uppá 800.000,- kr. og seta arbeiði í gongd. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. januar 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 22. januar 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tlmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. maj 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 28. mai 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið 30. mai 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. september 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við at seta arbeiði í gongd og at játta írestandi pening í 2025.

**Fíggjarnevnd 30. september 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið 03. oktober 2024**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini og Fíggjarnevndini dagf. 19. september og 30. september 2024

## 47/24 Gongubreyt í Norðragøtu, matr. nr. a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 24.04.2024 | 12/24 | 24/00172-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 29.04.2024 | 12/24 | 24/00172-2 |
| 3 Býráðið | 02.05.2024 | 17/24 | 24/00172-2 |
| 4 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.09.2024 | 32/24 | 24/00172-2 |
| 5 Vinnunevndin | | | 24/00172-2 |
| 6 Fíggjarnevnd | 30.09.2024 | 36/24 | 24/00172-2 |
| 7 Býráðið | 03.10.2024 | 47/24 | 24/00172-2 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur avsett pengar til gongubreyt fram við Ánna í Norðragøtu.

Umsitingin hevur fingið gjørt uppskot, sum partvís er gongubreyt og gøta fram við vegnum, umframt planting og trivnaðarplássum. Gøtan skal kennast sum ein natúrlig gonguleið fram við vegnum. Sí viðfesta uppskot.

Mælt verður til at taka undir við uppskotinum, bjóða part av arbeiði út og gera sáttmála.

**Ískoyti 23.09.2024**
Lýsing at ætlanini av gongubreytini í Norðragøtu:

Byggistig 1 er frá býráðshúsinum og niðan um Rokoko. Eftir at hava arbeitt við hesari ætlan, er umsitingin komin til eina loyst, har tað partvís er gongubreyt og gøta, umframt er tað gjørt møguligt at parkera fram við vegnum við at gera parkeringslummar, so hetta ikki tarnar aðrari ferðslu, og gongubreytirnar eru lagdar uttan fyri parkeringslummarnar, fyri at gera tað trygt hjá fótgangarum.

Tað eru ávís økir, at gonguleiðin liggur framman fyri parkeringsøkir t.d. hjá Rokoko, har er møguleiki í framtíðini, at gera eina gonguleið aftanfyri Rokoko.

Øki liggur oman mótið ánni og er hetta ein partur av heildini at gera gongubreyt og trivna á økinum, har fólk tíma at ganga og uppihalda seg, tí hava vit tikið plantin, gøtuljós og benkur við í verkætlanini.

Byggistig 1 er útboði og lægsta tilboði er umleið 2,3 mió. Arbeiði kann byrja í 2024 og verður liðugt í 2025. Planting o.a. uttan fyri býráðshúsinum er við í hesum útboðnum, hesin kostnaðurin er umleið 446.250,- kr. rin fyri gongubreytina er 2.329.118,- kr. Tølini eru við mvg og óvæntaðum útreiðslur.

Verandi Verkætlanin er deild upp í tvey byggistig, har byggistig 2 er víðari frá Rokoko og niðan til fyrstu útkoyringina til Landsvegin og er skipa við sama hátt sum byggistig 1 við gongubreytum, gøtum og trivnaði.

Fyri at koma á mál við hesari verkætlan ber til at deila hetta 3 byggistig, har byggistig 1 verður gjørt í 2024-25 og byggistig 2 og 3 verða gjørd í 2026 og 2027.

| | | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Byggistig 1 | 2.329.118,00 | 1.000.000,00 | 1.329.118,00 | | | Útboð |
| Planting -Býráðshúsið | 446.250,00 | 500.000,00 | | | | Útboð |
| Byggistig 2 | | | | 1.443.000,00 | | Meting |
| Byggistig 3 | | | | | 1.443.000,00 | Meting |
| | | 1.500.000,00 | 1.329.118,00 | 1.443.000,00 | 1.443.000,00 | |
| | | | | | | |
| Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina í rokna ókendar útr. og við mvg | | | | | **5.715.118,00** | |

Við hesari loysnini kostar verkætlanin meir enn um tað bara skal gerast ein gongubreyt fram við vegnum, uttan at taka hædd fyri ferðslutrygd og trivnað.

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 1.000.000,- kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við tilmælinum.<br><br>**Ískoyti 23.09.2024**<br>Mælt verður til, at taka av tilboðnum fyri byggistig 1, og undir skriva sáttmála, og seta írestandi pening av í 2025. |

## Byggi - og býarskipanarnevnd 24. april 2024

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, við tí ískoyti at gongubreytin skal verða omanfyri bygningin hjá Luna.

## Fíggjarnevnd 29. apríl 2024

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 02. mai 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. september 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við 1. byggistigi, við tí broyting plantingin uttan fyri býráðshúsið verður tikið úr tilboðnum, og hendan játtanin verður brúkt til gongubreytina í Norðragøtu.

**Fíggjarnevnd 30. september 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið 03. oktober 2024**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini og Fíggjarnevndini dagf. 19. september og 30. september 2024

## 48/24 Broyting av býarplani - matr. nr. 72f og 65a í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.06.2024 | 23/24 | 24/00419-3 |
| 2 Býráðið | 27.06.2024 | 37/24 | 24/00419-3 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.09.2024 | 33/24 | 24/00419-3 |
| 4 Býráðið | 03.10.2024 | 48/24 | 24/00419-3 |

**Málslýsing:**

Ynski er um, at broyta part av matr. nr. 72f og 65a frá øki H, Frílendi til øki E, Almennir stovnar, og at matr. nr. 72g verður allur gjørdir til øki E, Almennir stovnar. Hetta fyri at framtíðartryggja møguliga útbygging av Gøtubrá í Norðragøtu.

**Lýsing, verandi støða:**

- Matr. nr. 72g liggur í dag sum øki E, Almennir stovnar og ein partur av matriklinum liggur sum øki B1, Alternativ íbúðarbygging.
- Matr. nr. 65a liggur í dag sum øki H, Frílendi.
- Partur av matr. nr. 72f liggur sum øki H, Frílendi.

**Lýsing, framtíðar støða:**

- Matr. nr. 72g verður broyttur til øki E, Almennir stovnar.
- Partur av matr. nr. 72f skal broytast frá øki H, Frílendi til øki E, Almennir stovnar, sí kortskjal.
- Partur av matr. nr. 65a skal broytastt frá øki H, Frílendi til øki E, Almennir stovnar, sí kortskjal.

Mælt verður til, at gera hesar broytingar í býarætlanini.

**Ískoyti 23.09.2024.**

Vísandi til broytingar á matr. nr. 72f, 65a og 72g, er eisini neyðugt at gera aðrar tillagingar á niðanfyri nevndu matriklum. Talan er, um at tillaga verandi byggisamtykt við matrikul linjur.

Broytingin fevnir um matrikul nr., í Norðragøtu, 65a, 28e, 72x,
65b, 72c, 72v, 63a, 62, 72f, 25a, 72g, 31a og litra n.

Víst verður til viðfesta kortskjal í málinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Mælt verður til, at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

| **Ískoyti 23.09.2024** |
| --- |
| Umsitingin mælir til, at taka undir við broytingunum í býarplaninum. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 20. juni 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 27. juni 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. september 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingin.

**Býráðið 03. oktober 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini dagf. 19. september 2024

## 49/24 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 339m LV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.08.2024 | 24/24 | 24/00428-3 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.09.2024 | 34/24 | 24/00428-3 |
| 3 Býráðið | 03.10.2024 | 49/24 | 24/00428-3 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um keyp av matr. nr. 339m í Leirvík, eitt grundstykki í Fløtugerði byggistig 1. Umsøkjarin spyr um viðkomandi kann byggja hús í tveimum hæddum og selja kjallarahæddina burturav. Tað merkir, at í staðin at byggja sethús, so verður bygt íbúðarbygning í tveimum hæddum og har kjallarahæddin kann seljast.

Øki liggur í B2: Bústaðarøki við serstakari byggisamtykt. Eysturkommuna hevur ikki gjørt nakra serstaka byggisamtykt fyri hetta øki, men hevur støðumynd, frágreiðing og vegleiðing um hvussu tað skal byggjast á økinum, og tað fyriliggur ein býráðssamtykt fyri at hetta, ið er galdandi fyri byggingina á økinum.

Um loyvi skal gevast til hetta, er neyðugt at broyta byggisamtyktina og býarætlanina fyri øki.

Umsitingin mælir frá, at geva loyvi at byggja sethús við tveimum sjálvstøðugum búeindum á økinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongar

**Tilmæli**

Mælt verður til, at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. august 2024**

Málið tikið av skrá

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. september 2024**

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til, at geva loyvi at sundirbýta matrikulin til tveir matriklar, og gera tvær búeindir.

**Býráðið 03. oktober 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini og geva loyvi at sundirbýta matrikul nr. 339m í Leirvík til tveir matriklar og gera tvær búeindir

## 50/24 Umbøn um ummæli - Marknaumskipan - matr. nr. 80 og 56a í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.09.2024 | 35/24 | 24/00495-2 |
| 2 Býráðið | 03.10.2024 | 50/24 | 24/00495-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið teldupost dagfest 16. august 2024 frá Umhvørvisstovuni, har heitt verða á kommuna um at gera eitt ummæli til marknaðarumskipan millum matr. nr. 80 og 56a.<br><br>Sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at samtykkja ummæli til Umhvørvisstovuna. |

### Byggi - og býarskipanarnevnd 19. september 2024
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir til tilmælinum hjá umsitingini.

### Býráðið 03. oktober 2024
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Býggi – og býarskipanarnevndini

## 51/24 Skipan av matr. nr. 169 á Havnalagnum í Leirvík við Lugarið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.09.2024 | 36/24 | 24/00524-7 |
| 2 Vinnunevndin | 18.09.2024 | 7/24 | 24/00524-7 |
| 3 Býráðið | 03.10.2024 | 51/24 | 24/00524-7 |

**Málslýsing:**

Umsitingin hevur gjørt uppskot til skipan av Havnaøkinum í Leirvík við Lugarið.

Í uppskotinum verður lagt upp til, at byggja 9 frítíðarhús o.a. í tveimum hæddum. Sambært byggisamtyktini verður lagt upp til at hava útatvent verksemi í niðari hæddini. Harafturat er uppskot til at gera eitt sølutorg til bátar o.a. Sí tekningar.

Tað skal gerast ein serstøk byggisamtykt fyri økið, har umsitingin kemur at nágreina hæddir, takhall, útsjónd o.a. fyri at bygningarnir hóska til umhvørvið.

Grundøkini skulu frá matrikulerast, og kunnu seljast ella gerast til leiguøkir.

Kommunan leggur kloakkir til bygningarnir og mælir til, at tað verður kravt eitt íbindingargjald fyri kloakk og vatn.

**Ískoyti 18.09.2024**

Umsitingin hevur arbeitt víðari við at skipa øki við Lugarið í Leirvík, og sølutorgi er um at verða liðugt. Øki liggur í einum "C2, Vinnu- og miðstaðarbygging við serstakari byggisamtykt" har loyvi er, at hava útatventvirksemi. Umsitingin metti, at bygningarnir eru ov smáir til útatventvirksemi, og hava vit gjørt nýtt uppskot, har bygningarnir verða 5,5 metur breiðir í staðin fyri 4,5 metir, tað merkir so at tað verða 7 grundøkir í staðin fyri 9 grundøkir.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongar

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at góðkenna uppskotið, og arbeiða víðari við hesari ætlan.

**Vinnunevndin 18. januar 2023**

Vinnunevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingni.

**Fíggjarnevnd 23. januar 2023**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

**Býráðið 26. januar 2023**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

| |
|---|
| **Ískoyti 23.09.2024**<br>Umsitingin mælir til, at góðkenna nýggja uppskoti, og at annullera undanfarna uppskot. |

**Fíggjarnevnd 23. januar 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

**Býráðið 26. januar 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

**Vinnunevndin 23. september 2024**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 23.09.2024.

Petur Súni Jacobsen var ikki á fundinum.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. september 2024**

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini dagfest 23.09.2024.

**Býráðið 03. oktober 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Vinnunevndini og Byggi – og býarskipanarnevndini dagf. 23. september 2024

## 52/24 Broyting í býarplani - Partur av matr. nr. 36a í Syðrugøtu verður broyttur frá A Miðstaðarøki til B Bústaðarøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.09.2024 | 37/24 | 24/00539-1 |
| 2 Býráðið | 03.10.2024 | 52/24 | 24/00539-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur samtykt at liggja part av matr. nr. 36a aftrat matr. nr. 154 og 189 í Syðrugøtu.<br><br>Í hesum sambandi er tørvur á at broyta býarplanin fyri hesi økini frá A, Miðstaðarøki til B, Bústaðarøki, haraftrat er ætlanin, at gera somu broyting fyri matr. nr. 187.<br><br>Sí skjal í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við hesum broytingum. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. september 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 03. oktober 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini

## 53/24 Skúlin í Leirvík - matr. nr. 422a LV - Útbjóðing

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.09.2024 | 38/24 | 24/00540-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 30.09.2024 | 37/24 | 24/00540-1 |
| 3 Býráðið | 03.10.2024 | 53/24 | 24/00540-1 |

**Málslýsing:**

Projekteringin av skúlanum í Leirvík er komin so mikið ávegis, at hendan verkætlanin verður klár at bjóða út fyrst í oktober, og støða skal takast til hvussu hetta skal bjóðast út.

Tað eru tveir háttir at gera hetta uppá, og tað Høvuðsarbeiðstøku ella fakarbeiðstøku.

**Høvuðsarbeiðstøka:**
Her er ein høvuðsarbeiðstakari, sum velur sjálvur sínar undirveitarar og hesir eru ikki altíð bíligast. Men tikið verður altíð av bíligasta innkomna tilboðið, og soleiðis er trygd fyri kostnaðinum. Við Høvuðsarbeiðstøku hevur byggileiðslan bert høvuðsarbeiðstakaran at fyrihalda seg til, tí høvuðsarbeiðstakarin hevur ábyrgd av sínum undirveitarum, harumframt er ábyrgd hjá høvuðsarbeiðstakaranum at samskipa arbeiðsfakini undir bygging. Hetta krevur minni orku hjá byggileiðsluni.

**Fakarbeiðstøka:**
Her verða arbeiðstøkurnar bodnar út sum fak, og byggiharrin skal fyrihalda seg til nógvar arbeiðstakarar í senn. Hesin útboðshátturin tryggjar at man altíð fær bíligastu arbeiðstøkurnar. Hetta krevur sera nógva koordinering av byggileiðsluni undir byggingini, og tað má eitt starvsfólk fulla tíð arbeiða við hesum.

**Licitatión**
Tað eru tríggir mátar at gera hetta uppá Almenn licitatión, avmarkað licitatión ella innboðin licitatión.

**Almenn licitatión:**
Við almennari licitatión kunnu øll bjóða, byggiharrin hevur tó møguleika at stilla krav um, at arbeiðstakarin skal dokumentera, at fyritøkan er før fyri at lyfta uppgávuna, bæði tekniskt, arbeiðs- og fíggjarliga orku.

**Avmarkað licitatión:**
Avmarka licitatión er licitatión við undangóðkenning, her avmarkar byggiharrin arbeiðstakarar, við at biða um eina undangóðkenning, tað vil siga, at man fyrst hevur eina undangóðkenning av arbeiðstakaranum og síðan kunnu góðkendu arbeiðstakarnir fáa útbjóðingartilfarið og bjóða uppá arbeiði.

**Innboðin licitatión:**

| |
|---|
| Innboðin licitatión hevur byggiharrin avmarkað seg til ávísar arbeiðstakarar uttan undangóðkenning at bjóða, hesir arbeiðstakarnir verða mettir at hava bæði tekniskt, arbeiðs- og fíggjarliga orku til verkætlanina. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at bjóða verkætlanina út sum høvuðsarbeiðstøka við innbodnari licitatión. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. september 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 30. september 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið 03. oktober 2024**
Einmælit samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini og Fíggjarnevndini

# 54/24 Tilmæli og frágreiðing - Fíggjarætlan 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 30.09.2024 | 38/24 | 24/00543-2 |
| 2 Býráðið | 03.10.2024 | 54/24 | 24/00543-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi skjøl til 1. viðgerð av fíggjarætlan fyri 2025 |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at beina málið í føstu nevndinar til víðari viðgerð. |

**Fíggjarnevnd 30. september 2024**

Fíggjarnevndin mælir til at beina málið í føstu nevndinar til víðari viðgerð

**Býráðið 03. oktober 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini

fundurin lokin18:30

---

Per Martin Gregersen

---

Katrin Kjartansdóttir

---

Magnus Skoralíð

---

Marjun Andreasardóttir

---

Rúni Justinussen

---

Marita Klein Joensen

---

Petur Súni Jacobsen

---

Hjalti Dalheim

---

Hanna Jensen